Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verpápi, abbi og bróðir okkara

**Niels á Krákusteini**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 20. januar, 51 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mánadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin kl. 13.00.

*Famljunnar vegna*
**Eyrith og børnini**

Tey, ið vilja minnast Niels, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

---

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Anna Jensen**
**ættað av Sandi**
**búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Tjarnargarði mikudagin, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Adventistakirkjuni sunnudagin kl. 11.00

*Familjunnar vegna*
**Pól, Jógvan, Bergur, Elinborg, Jórun og Anna**

Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata Tjarnargarði eina gávu, konta í peningastovnunum.

---

Kunngjørt verður, at elskaða kona mín

**Kristianna Joensen**
**Leirvík**

andaðist hósmorgunin á Landssjúkrahúsinum, 77 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum leygardagin kl. 14.00 í Leirvíkar kirkju.
Jarðarferðin verður sunnudagin kl. 14.00 úr Leirvíkar kirkju.

**Jógvan Elias**

Tey, ið vilja minnast Kristionnu, kunna lata Krabbameinsfelagnum eina gávu á konto í peningastovnunum.

---


## Leys størv í Tórshavnar kommunu

### SAMSKIFTISFÓLK

Søkt verður eftir samskiftisfólki til fulltíðarstarv á stjórnarskrivstovuni at byrja skjótast møguligt. Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Umsóknarfreistin er 2. februar 2011 kl. 12.00.

**Uppgávurnar eru m.a.:**
- Skriva tekstir, herundir tekstir til heimasíðu og intranet, týða og rættlesa
- Skriva og arbeiða við lýsingum og kunngerðum til heimasíðu og fjølmiðlar
- Taka myndir og viðgera tær
- Vera við til at fyriskipa og fremja tiltøk, vitjanir, ferðir o.a.

Meira fæst at vita um starvið á www.torshavn.fo

### PEDAGOGAR

Tórshavnar kommuna søkir vegna Miðstovnin í Gundadali eftir einum pedagogi til verkstað, fyri pedagog í farloyvi, at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber. Starvstíðin er fram til 31. desember 2010.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsókn**
saman við viðmælum upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 6, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 7. februar 2010.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Astu í Toft, leiðara, tlf. 316042, ella við at hyggja á heimasíðu okkara www.midstovnurin.fo.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA


# Kjak



**Beinta Løwe Jacobsen**
*Redaktiónsleiðari*
*Kringvarp Føroya*

## Svar til Edmund Joensen

Lat meg enn einaferð gera greitt, at tíðindadeildin leggur stóran dent á óheftni í okkara virki. Fari aftur at vísa á, at tíðindaflutningur okkara í Eik málinum bygdi á skjøl, sum vit høvdu fingið innlit í, og at hetta vóru nýggjar upplýsingar, sum vóru viðkomandi fyri málið.

Tú sigur, vit bera ósonn tíðindi, men eg vil staðiliga vísa hesum aftur, og fari at heita á teg um at lata vera við at koma við tílíkum ákærum. Eg fari samstundis at vísa tær á møguleikan tú hevur at klaga til fjølmiðlanevndina, um tú er misnøgdur og heldur okkurt vera at klaga um.


